FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Fylgiskjal 2

Tórshavn, 29. februar 2024
Málsnr.: 23/25586

Ummælisskjal

viðvíkjandi uppskotið til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Virkisskrá

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Virkisskrá varð lagt til hoyringar tann 17. januar 2024. Freistin at koma við viðmerkingum var 7. februar 2024.

Hoyringarsvar er komið frá:

- Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum
- Felagið Peningastovnar
- Skráseting Føroya
- Vinnuhúsinum

Sum úrslit av hoyringini eru gjørdar tvær tillagingar í lógaruppskotinum. Hesar eru:

1. Í § 15, stk. 2 er orðingin broytt fyri at ganga á møti einum ivamáli frá Felagnum Peningastovnar.
2. Tá nummur verða strikað, flyta tey eftirfylgjandi numrini raðfylgju.

Viðmerkingarnar frá Felagnum Peningastovnar kunnu lesast niðanfyri. Svar frá Fíggjarmálaráðnum eru skrivað við skákskrift.

Skráseting Føroya og Vinnuhúsið hava boðað frá, at tey onga viðmerking hava til uppskotið. Arbeiðs- og Brunaeftirlitið mælir til, at uppskotið verður samtykt.

Fyri at síggja hoyringarsvarini í fullum líki, verður vist til sjálv hoyringarsvarini, ið eru viðfest sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Felagið Peningastovnar
Eitt av endamálinum við uppskotinum er at geva, eitt nú peningastovnum atgongd til p-tølini í Virkisskránni ella við øðrum orðum at heimila Virkisskránni at flýggja peningastovnum p-tøl úr Virkisskránni.

Í § 1, nr. 7 (áður § 1, nr. 5) í uppskotinum verður sagt:

> **7.** (áður 5.) § 15, stk. 2, verður orðað soleiðis: *"Privat kunnu bert viðgera p-tøl samsvarandi løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum".*

Orðingin kann geva ta fatan, at tað er í lógini um Virkisskrá, at rætturin at viðgera p-talið verður stovnaður.

Til hetta er at viðmerkja, at peningastovnar frammanundan hava heimild at viðgera persóntalið, sbr. § 16, stk. 2 í dátuverndarlógini:

Dátuverndarlógin § 16, stk. 2:
"Stk. 2. Privat kunnu viðgera upplýsingar um persónstalið, tá ið:
1) viðgerðin er heimilað í lóg,
2) skrásetti hevur givið nágreiniligt samtykki,
3) treytirnar í § 12 eru loknar, ella
4) viðgerðin bert fer fram til søgulig, vísindalig ella hagfrøðilig endamál."

Dátuverndarlógin § 6, stk. 1, nr. 2 allýsir viðgerð soleiðis:
"Í hesi løgtingslóg er at skilja við:
2) Viðgerð: Øll nýtsla, so sum savnan, skráseting, samkoyring, goyming, víðarigeving, avhending o.a. ella ein sameining av hesum, líkamikið um henda er automatisk ella ei."

Mælt verður til at orða § 15, stk. 2 soleiðis, at eingin ivi er um, at p-tøl úr Virkisskránni kunnu flýggjast út til privat virkir, um so er – ella treytað av – at tey hava heimild at viðgera p-tøl samsvarandi dátuverndarlógini (§ 16, stk. 2 í dátuverndarlógini).

Fíggjarmálaráðið:
§ 15, stk. 2 skal lesast saman við § 15, stk. 1 í løgtingslóg um Virkisskrá, har tað stendur: "Øll kunnu fáa útflýggjað grundardátur úr Virkisskránni, tó við teim undantøkum og treytum, nevndar í stk. 2-6 ella í aðrari lóggávu." Ásetingin í § 15, stk. 2 snýr seg tískil bert um viðgerð av p-talinum í sambandi við útflýggjan av grundardátum úr Virkisskránni, og ikki um rættin at viðgera p-talið sum heild.



Fyri at einki ivamál skal vera um hetta, er orðingin av § 15, stk.2 tillagað soleiðis:

"Privat kunnu bert fáa útflýggjað p-tøl úr Virkiskránni samsvarandi løgtingslóg um vernd av persónupplýsingum".

Felagið Peningastovnar
Harumframt hava vit hesar viðmerkingar av meira tekniskum slagi:

Í § 8, stk. 1 verður nr. 12 strikað; í stk. 2 verður nr. 9 strikað og í stk. 3 verður nr. 9 strikað. Í hesum sambandi mangla konsekvensrættingar, soleiðis at nr. 13-16 í § 8, stk. 1 verður broytt til nr. 12-15. Í stk. 2 verða verandi nr. 10-11 broytt til 9-10 og í stk. 3 verður verandi nr. 10 broytt til nr. 9.

Eftir hetta eigur broytingaruppskotið § 1, nr. 4 at verða soljóðandi:
"Í § 8, stk. 1 verður aftaná nr. 16, sum nú er vorðið nr. 15, sum nýggj nummur sett: 16) Eigaraupplýsingar og 17) Roknskaparár."

Fíggjarmálaráðið:

Hetta verður tikið til eftirtektar og rættað.